



# Sendandi oman av Myrkjanoyrarfjalli

**Mikudagin í jólavikuni flutti tyrlan 14 menn niðan á Myrkjanaroyrarfjall, haðani teir óku á skí oman.Ein ótrúlig uppliving, sigur Petur Martin Solmunde**



Randi Jacobsen

Hóast kavin ikki er nógvur hvønn vetur, livir skíítrótturin væl í Klaksvík.

Í ár hava klaksvíkingar gjørt fleiri skítúrar av Myrkjanoyra-fjalli.

- Vit geva boð um Facebook og ringja annars runt, sigur ein av fyriskiparunum, Petur Martin Solmunde.

Í góðveðrinum mikudagin fóru teir ein túr, 14 menn. Teir fingu tyrluna hjá Atlantsflog at flyta seg niðan og rindaðu 250 krónur hvør. Tyrlan tekur sjey ella átta menn hvørja ferð.

Teir flestu eru sera royndir í at standa á skí.

Í nógva kavanum fyrst í árinum gjørdu teir fleiri túrar. Ein dag vóru teir 27 menn.









